

*Hilmar á sínum 80 ára føðingardegin saman við Kristonu, sum hann hevur búð hjá í 30 ár*



***Á myndini eru frá vinstru:** Dánjal Nielsen, Klaksvík, Rigmor, systir Hilmar, Hilmar og Anna í Garði, Strendur. Hilmar er mammubeiggi Dánjal og Annu, tey er børn hjá Kristianu, sum var gift í Sandavági við Tummas Nielsen*



*Hilmar og systir hansara Kristiana Nielsen í Sandavági. Her eru tey á hennara 80-ára føðingardegi*



*Á Lágargarði jólaaftan 2008. Tað hevur verið jólagudstænastuna við deyvatulki. Nakrir trúgvir deyvir vinir Hilmars eru komnir at ynskja honum gleðilig jól. F.v. Anna, dóttir Kristonu og Marius Rein, Edny Poulsen, teknmálstulkur og vinur hjá Hilmar, Hilmar, Hermundur Zachariassen, eitt av deyvu systkjunum úr Norðragøtu, Malfríð og Hans Hansen, eisini úr Norðragøtu*

fóru teir seinni aftur umborð á trolaran Tindhólm og skonnartina Hvítubjørn.

Tað var Skipafelagið Føroyar, sum átti Tinganes, sum áður mangan brattan hevði farið og komin væl burtur úr tí.

Tá ið Tinganes var sokkin á Kappanum og manningin var komin umborð á hini skipini sum vóru har, spurdi skiparin á Vesturvón skiparan á Tinganesi, um hann kundi vísa sær á tveir góðar menn, sum hann kundi biðja við Vesturvón túrin út, tí hann manglaði fólk. Skiparin á Tinganesi vísti honum fyrst á Hilmar.

Sigast kann eisini, at tað altíð kom nakað burtur úr, tá ið Hilmar arbeiddi, tí sum onkur segði: "Hann snakkar ikki tíðina burtur!"

Hilmar fer umborð á Vesturvón og fiskar við teimum túrin liðnan og teir kom heim í november mánað. Vesturvón var eitt av teimum nýggju línuskipum, sum komu til Føroyar seinast í 50-unum.

Hann varð avloystur av trolarانum Vesturvón, sum so aftur varð afloystur av tí verandi Vesturvón.

## Verið við sjey forlistum skipum

Í 1965 fer Hilmar við línuskipinum Varðberg og er við har til skipið verður selt til Klaksvíkar í 1970. Hann gjørdist til ídnaðarfiskskipið Komet, sum sakk nakað seinni.

Tað er nokkso sjáldsamt, at ikki færri enn sjey av teimum skipum, sum Hilmar hevur verið við, eru forlist, trý av teimum við mannskaða. Hann var tó sjálvur bert við at forlissa eina ferð, tað var við Tinganes.

Hilmar hevur annars greitt frá, at mamma hansara eina ferð fekk hann frá at fara við skipi, sum gekk burtur júst tann túrin.

## Legst uppá land

Frá 1970 til 1978 býr Hilmar í Norðagøtu, har hann hevur fyrifallandi arbeiði, mest at smíðja, tí Hilmar er sera hegnigur maður. Orsøkin til, at Hilmar fer til Gøtu mundi vera, at har kundi hann vera millum deyvar javnlíkar. Har var jú ein familja, sum átti fimm deyv børn. Hann búði fyrst hjá Annelenu og Jákupi Zachariassen, foreldrunum hjá hesum deyvu systkum, og seinni hjá Arnbjørg, sum var eitt teirra, og manni hennara Bruno, sum júst er deyður. Í Gøtu var Hilmar í fleiri ár egningarformaður, serliga hjá Bruno, sum hevði útróðrarbát.

Í 1978 flytur Hilmar til Havnar at búgva, har hann ger fyrifallandi arbeiði. Í nógv ár var Hilmar pedellur í tí tá nýggja Deyvahúsinum.

Í eini 30 ár búði Hilmar hjá Kristionu og Marius Rein. Hilmar er ommubeiggi Kristionu. Tey bæði eru eisini ein av keldunum til hesa grein og hava verið við til at gera hana.

## Dámdi væl at ferðast

Hilmar hevur dámað sera væl at ferðast, og í nógv ár fór hann hvørt summar við Lómi hjá Skipafelagnum til Danmarkar at vitja vinfólk. Har plagdi hann at vera í 1-2 mánaðir.

Eisini hevur hann ofta verið til Nordisk Døve-Pensionistræf í Finlandi, Svøríki, Danmark og í Íslandi í 1985, har hann heilsaði uppá Vígdis Finnbogadóttir, forseta Íslands.

Hilmar hevur eisini verið við til alheimsdeyvaráðstevnur, í 1982 í Sveits, í 1986 í Wales og í 1990 í Hollandi.

## Øll á Lágargarði eru góð við Hilmar

Í 1991 sleppur hann inn á dagstovnin á Lágargarði, og har hevur honum dámað so sera væl. Har hevur hann loyst úr lagdi, spunnið og vevað, og mangur gólvløbari er komin úr hansara hondum. Eisini dugur hann væl at binda. Framvegis tekur hann hond í síni ítriv. Í 2007 sleppur Hilmar at búgva á Lágargarð, har hann trívist væl.

Hilmar kann sigast at hava havt eitt ríkt lív og hevur upplivað nógv í sínum "deyva" lívið, tí tað, sum hann ikki hoyrdi, upplivdi hann gjøgnum hinar sansir sínar, mest gjøgnum eyguni, tí eygleiðari er hann góður.

Eitt stórt framstig hjá teimum deyvu er tann skipaða teknmálstulkingin, sum kom í lag fyri nøkrum árum síðani.

Ein av hesum tulkum er Edny Poulsen. Hon er tískil eisini komin at kenna Hilmar sera væl. Edny sigur Hilmar vera eitt framúr menniskja. Hann er góðsligur og fittur, og øll, sum eru um Hilmar, eru góð við hann. Hann er eisini sera góður við børn. Honum dámar eisini at arga starvsfólkið á Lágargarni, men hetta er bert í spølni.

Hilmar hevur eisini fortalt Edny nógv. Einaferð hitti hann tvær eldri konur, sum hann hevði kent frá barndóminum í Miðvági. Tá ið tær funnu fram til hvør hann var, skóru tær útí at gráta. Tær mintust sum barn, at hann bert var horvin úr heimliga umhvørvinum. Tær høvdu tí alt sítt lív hildið, at hann var deyður longu tá. Tað var ein serlig upplivling á gamalsaldrinum at finna hann á lívi.

Tað hevur verið hugaligt at kunna skriva hesi brot úr lívinum hjá Hilmari. Tað ber til at lesa meira um søguna hjá deyvu, eisini hjá Hilmari, í bókini "Søgan um Hini", sum eisini hevur verið ein kelda til hesa grein.

Samstundis senda vit Hilmar eina heilsan. Hann hevur verið ein knassi!